StÍF-VÍF 26-22 (12-9):

# Strandaðir vestmenningar

**StÍF hevur framvegis møguleika at gera seg galdandi í oddinum. Eftir sigurin á VÍF – sum við hesum er heilt úti í kuldanum – eru nú bert tvey stig upp til oddaliðið úr Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Fráveran av Sveini hevur aftur flutt stórar byrðar yvir á Artur Johansen, og hann verður helst ein av avgerandi leikarunum, um StÍF fyri triðju ferð í fýra ár skal gerast steypavinnari komandi leygardag*

Sært tú onkran vestmenning liggja í svøvni. Hálvgum rópani um hjálp, samstundis sum hann nevnir okkurt um teir hvítu av Strondum, so lat hann abra sova. Ivaleyst er tað bert marran um enn eitt møti við strandingar, sum plágar, og tað er tað sum so einki forgjørt í.

StÍF hevur nevnliga hesi seinnu árini fingið sær tann vana – í Vestmanna siga tey helst óvana – at júst VÍF er eitt lið, sum bara skal vinnast. Í steypakappingini hava strandingarnir fýra ár á rað verið endastøðin hjá VÍF, og eisini í landskappingini hava teir ofta verið tungir at syfta hjá VÍF.

**Tveittu alt burtur**

Sunnudagin hittust liðini so fyri triðju ferð innan góða viku, og aftur hesa ferð endaði alt við sigri til StÍF. Longu fyrstu løtuna bendi alt á, at talan skuldi gerast um tryggan heimasigur, men sum hálvleikurin leið, so kom VÍF tó alt betri við.

Seinastu løtuna fyri steðgin var tað tó, sum um einki vildi bera til hjá gestunum. Eitt eyðkenni, sum hevur sermerkt VÍF hetta kappingarárið, har teir fleiri ferðir hava mist takið á dystum júst seinastu tíggju minuttirnar undan steðginum. Strandingar skutu seg hesaferð av 8-8 upp á 12-9, og hetta var ein leiðsla, sum VÍF ongan tíð megnaði at vinna aftur.

Seinna hálvleik var annars fleiri ferðir um reppið, at tað skuldi eydnast VÍF at toga aftur, men hvørja ferð talan var um ein avgerandi møguleika, so varð ikki tikið av hesum. Fleiri ferðir vórðu óneyðugir bóltar tveittir burtur, og eitt mundi tað kennast sera rámandi fyri ójøvnu avrikini hjá liðnum í ár, at Sámal Joensen bert fekk eitt mál hesaferð. Hann fekk 14 mál, tá VÍF vitjaði á Skála fýra dagar undan hesum dystinum!

**StÍF hongur í oddinum**

Og hjá VÍF mundi tapið kennast sum enn eina staðfesting av, at hetta á ongan hátt verður teirra kappingarár. Sum støðan hevur verið, so hevur liðið annars havt fleiri møguleikar at nærkast oddinum, soleiðis at eitt sindur av stuttleika kundi komið í, og møguleikan høvdu teir eisini hesaferð.

Treytin var, at Neistin skuldi vinna høvuðsstaðaruppgerðina, men tá vestmenningar sjálvir ikki megnaðu at taka av, so kundi hetta vera tað sama fyri teirra viðkomandi.

Tað kundi tað hinvegin ikki vera hjá StÍF, sum nú av álvara hevur fingið samband við oddin aftur. Tapið hjá Kyndli merkti, at teir nú bert eru tvey stig omanfyri strandingarnar. Ein munur, sum kann hvørva heilt, tá liðini hittast annað vikuskiftið.

Akkurát tann dysturin er tó neyvan tann, sum stendur fremst í hugaheiminum hjá StÍF í løtuni. Fjórða árið á rað eru teir partur av steypafinaluni, og hesaferð mugu teir eisini lata sær lynda at verða róptir favorittar til dystin.

Tað skerst tó ikki burtur, at liðið uttan Svein Justinussen hevur mist kanska mest týðandi álopsvápnið, og í Marian Cirloganescu má vera ein stinnan málverja fyriuttan. Higartil hava tað tó verið aðrir, sum hava megnað at lyft arvin eftir hesar, og tað fara teir so aftur at royna leygardagin.

## Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Neistin | 129 | (21) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 117 | (30) |
| Nicoleta Radu | Søljan | 105 | (20) |
| Ioana Rápa | VÍF | 100 | (25) |
| Katarina Stepanov | Stjørnan | 88 | (19) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 88 | (20) |
| Daiva Tuomaite | VB | 87 | (15) |
| Gurið Mortensen | VB | 79 | (6) |
| Nikolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 77 | |
| Irina Rodevici | VÍF | 74 | |
| Annika Ljósstein | Stjørnan | 73 | (18) |
| Milica Ergic | StÍF | 70 | (8) |
| Joan M. Djordjevic | Stjørnan | 67 | (24) |
| Heidi Maria Akselsen | Søljan | 62 | (4) |
| Lina Andriulyte | Neistin | 60 | |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Blagoje Buha | Neistin | 90 | (22) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 89 | (9) |
| Dragisa Stojovic | Neistin | 88 | (3) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 82 | (29) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 64 | |
| Ingi Olsen | VÍF | 60 | (20) |
| Agnar Joensen | VÍF | 59 | (7) |
| Áki Mørk | Neistin | 55 | (8) |
| Damir Oros | KÍF | 55 | (19) |
| Alexandur Johansen | StÍF | 54 | (21) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 51 | |
| Høgni Klein | Kyndil | 50 | (2) |
| Artur Johansen | StÍF | 49 | (10) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 45 | (4) |
| Josef Abrahamsen | Kyndil | 45 | (6) |

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 4 | 3 - 0 - 1 | 409 | 326 | 83 | 17 |
| 2 VB | 4 | 4 - 0 - 0 | 425 | 322 | 103 | 16 |
| 3 VÍF | 4 | 2 - 0 - 2 | 407 | 342 | 65 | 13 |
| 4 Neistin | 3 | 2 - 0 - 1 | 385 | 339 | 46 | 12 |
| 5 StÍF | 2 | 0 - 0 - 2 | 314 | 372 | -58 | 5 |
| 6 Søljan | 2 | 0 - 0 - 2 | 262 | 347 | -85 | 2 |
| 7 Kyndil | 3 | 0 - 0 - 3 | 242 | 396 | -154 | 1 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 2 | 1 - 0 - 1 | 354 | 327 | 27 | 11 |
| 2 Neistin | 2 | 2 - 0 - 0 | 345 | 311 | 34 | 10 |
| 3 StÍF | 2 | 1 - 0 - 1 | 295 | 280 | 15 | 9 |
| 4 VÍF | 2 | 0 - 0 - 2 | 311 | 300 | 11 | 6 |
| 5 KÍF | 2 | 1 - 0 - 1 | 292 | 342 | -50 | 5 |
| 6 H71 | 2 | 1 - 0 - 1 | 288 | 325 | -37 | 4 |

**Dysturin í tølum**

**StÍF-VÍF 26-22 (12-9)**

**Málskjúttar**

**StÍF:** Bent Djurhuus 6, Alexandur Johansen 4(1), Sverri Justinussen 4, Borgar Danielsen 4, Artur Johansen 1(1), Pauli Hansen 1, Andre F. Danielsen 1

**VÍF:** Johnny Joensen 8, Agnar Joensen 4(2), Daniel Rápa 3, Áki G. Olsen 3, John Zachariasen 2, Sámal Joensen 1, Áki Olsen 1.

**Brotskøst:** StÍF 4, VÍF 2

**Útvísingar:** StÍF 4, VÍF 10

**Dómarar úr Kyndli:** Hannis Wardum & Uni Wardum.



# Pedagogur

## til Barnaansingarstovnin inni á Bakka

Vágs Kommuna søkir við hesum eftir einum pedagogi til Barnaansingarstovnin inni á Bakka.

**Vit ynskja**

- at tú hevur hug og áræði at skapa ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag saman við børnunum.
- ert við til at menna tað pedagogiska arbeiði.
- hevur gott foreldra og starvsfólka samstarv.
- at tú dámar væl at verða úti við børnunum.

**Lønar- og setanarviðurskifti**

starvið verður sett frá 15. mars 2004.
Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala arbeiðsgevarafelag.

**Meira fæst at vita**

um starvið við at venda sær til Unn Michelsen leiðara á telefon 37 33 83.

**Umsókn**

saman við viðmælum og upplýsinging um útbúgving, skulu verða Vágs Kommunu í hendi í seinasta lagi 01. mars 2004.

Viðmerk á brævbjálvan »pedagogur«

**Vágs Kommuna**
**Mentanarnevndin**

# Skrivari

**Fyri skrivara okkara verður søkt eftir fólki til starvið sum skrivari fyribils í 1 ár, við møguleika fyri framhaldandi starvi í fyritøkuni.**

**Starvið:** Talan er um áhugavert starv sum skrivari fyri stjóran. Harumframt eru fleiri sjálvstøðugar uppgávur at loysa hjá skrivaranum.

**Útbúgving:** Tú skal hava royndir í at arbeiða við teldu og duga at nýta forritini Word og Excel. Ástøðilig útbúgving er góð, men er eingin treyt. Dentur verður lagdur á, at tú hevur áræði, kanst virka sjálvstøðugt og hevur royndir innan skrivstovuyrkið. Góður kunnleiki til mál, og serliga føroyskt, gevur fyrimun.

**Vit bjóða tær:** Góð arbeiðsviðurskifti, góða løn við eftirlønarskipan í samsvari við útbúgving og royndir og góðar møguleikar fyri persónligari menning.

**Umsóknir:** Skrivligar umsóknir skulu sendast til:
**P/F Føroya Shell · Postboks 188**
**110 Tórshavn**, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 12. februar 2004.
Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast Janu Rasmussen, skrivara á telefon 347400.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Shell

Sosialurin 341800

## Góðir brúktir bilar

**Nissan Almera 1.6 GX** grønur, árg 1999, 4 hurðar, km 76.000 **89.000**

**Ssangyong Musso 2.9D 4x4 100 HK Van** grønur, árg 1997, 5 hurðar, km. 102.000, seldur fyri kunda **130.000**

**Nissan Almera 1.5 Comfort** bláur, árg 2002, 5 hurðar, km 11.000 **135.000**

**Honda Accord 1.8** gráur, árg 2000, 4 hurðar, km. 98.000 **115.000**

**Nissan Patrol 3.0 Di Elegance, persónbilur** bláur, árg 2000, 5 hurðar, km 62.000 **v/mvg 349.000**

**Honda Accord 2.0** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 96.000 **155.000**

**Peugeot 405 1.6 GR** bláur, árg. 1989, 4 hurðar, km. **27.000**

**Hyundai Elantra 1.6 GLS** grønur, árg. 1998 4 hurðar, km. 69.000 **67.000**

**Peugeot 406 1.8** grønur, árg. 1997, 4 hurðar, km. 129.000 **99.000**

**Citroen Xantia 2.0 Hdi Station Car** grønur, árg 2000, km. 110.000 **148.000**

**Peugeot 406 ST 2.0 Hdi v/aircon** vínreyður, árg. 1999, 4 hurðar, km. 120.000, fyrr 145.000 **nú 135.000**

**Ford Fiesta 1.3** reyður, árg 1997, km. 88.000 **46.000**

**Peugeot 406 ST 2.0** gráur, árg. 1999, 4 hurðar, km. 63.000 **130.000**

**Ford Escort 1.8** bláur, árg 1995, 4 hurðar, km. 101.000 **59.000**

**Peugeot 406 ST 2.0 Hdi** svartur, árg. 2002, 4 hurðar, km. 35.000 **185.000**

**Ford Orion 1.8 Diesel** bláur, árg 1991, 4 hurðar, km. 131.000 **25.000**

**Opel Agila 1.2** grønur, árg 2001, 5 hurðar, km. 36.000, fyrr 110.000,- **nú 95.000**

**Hyundai Accent 1.5** gráur, árg 2000, 5 hurðar, km. 92.000 **97.000**

**Opel Corsa 1.2** svartur, árg 2001, 3 hurðar, km. 51.000 **89.000**

**Fiat Scudo 2.0 Hdi VAN** hvítur, árg 2002, 4 hurðar, km. 35.000 **v/mvg 160.000**

**Opel Astra 1.7 DT** grønur, árg 1997, 4 hurðar **65.000**

**Fiat Marea 1.9 DT Station Car** ljósabláur, árg 1997, 5 hurðar, km. 135.000 **78.000**

**Opel Vectra 1.7 DT** grønur, árg 1995, 4 hurðar, km. 210.000 **65.000**

**Toyota Corolla 1.6 St.Car Linia Terra** grønur, árg 2002, 5 hurðar, km. 18.000, seldur fyri kunda **160.000**

**Opel Vectra 2.0 CD** svartur, árg 1997, 4 hurðar, km. 87.000 **95.000**

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 345400,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin 341800

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3384, P/F H.K. Ognarfelagið, 100 Tórshavn.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Beinir Johannis Juul Poulsen, 270 Nólsoy.
**Innkomin í nevndina:** Suni Norðbø Andreassen, Ovaragøta 50, 188 Hoyvík.

*Skráseting Føroya tann 30. janaur 2004*

*Kristin Balle*

FISH & CHIPS
Tilboð hesa vikuna
Chicky Wings og
1 sodavatn frá Føroya Bjór
kr 47,-
Upplatingartíðir:
mán-týs-mik 12-14 og 17-23
hós-frí 12-14 og 17-24
leyg 17-24
sun 17-23
FISH & CHIPS · tel 317405

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

**Mentamálaráðið**
*Vinnu- og Miðnámsskúladeildin*

# UNITED WORLD COLLEGE

Red Cross Nordic United World College Foundation bjóðar einum føroyskum skúlanæmingi, ið er liðugur í 1. studentaskúlaflokki á sumri 2004, at taka IB (International Baccalaureate) eftir 2 árum á einum altjóða studentaskúla í Dale í Noregi. Dale liggur umleið 100 km norðan fyri Bergen. IB (International Baccalaureate) er eitt altjóða studentsprógv, ið gevur somu rættindi sum eitt føroyskt studentsprógv.

Endamálið hjá skúlanum er at fremja altjóða sátt og semju í verki, og verður hetta m.a. gjørt við, at næmingar úr umleið 70 ymiskum londum búgva og lesa saman á skúlanum.

Stuðulsstovnurin rindar - eftir umsókn - skúlagjaldið, og næmingurin, ið fer á United World College, fær útbúgvingarstuðul frá Stuðulsstovninum eftir somu treytum sum miðnámsskúla-næmingar í Føroyum.

Nærri upplýsingar um skúlan fáast við at venda sær til Mentamálaráðið ella til lestrarvegleiðingina á skúlanum, har tú gongur. Tú kanst eisini finna fleiri upplýsingar um skúlan á hesi heimasíðuni:
www.rcnuwc.uwc.org

Umsókn um upptøku á Red Cross Nordic United World College, ljóstak av støðumetan saman við eini stuttari frágreiðing um teg sjálva/n skulu vera Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 24. februar 2004. Gjørt verður vart við, at einki umsóknarblað finst.

**2. februar 2004**
**Mentamálaráðið**

# Jeepur til sølu

Mitsubishi Pajero 2,5 TD, 4x4
Árg. 85, Sýnaður í juni 2003
Bilurin er í góðum standi
Hevur setur í og selist við MVG

FIAT
Bilfríðkan
Velbastaðvegur 78
**Tel. 317300 ella 217300**